# rkomnir fyri vinnulívið




*Kortið sýnir, hvar komandi leitingarbrunnarnir verða boraðir*



*Landstýrismaðurin ivast ikki í, at komandi leitingarumfarið fer at skapa hópin av aktiviteti til føroyskt vinnulív*

at stóru oljufeløgini vilja gera alt fyri at bera seg rætt at í okkara parti av heiminum, skulu tey sleppa at arbeiða her. Tey taka stór atlit til at reka skilagóðan starvsfólkapolitikk, umhvørvispolitikk osfr. Tí síggi eg ongan vanda í at fáa hesi stóru oljufeløg henda vegin. Tað áliggur teimum eisini at gera sítt arbeiði til lítar, tá tey fáa so stóra ábyrgd.

Oljumálaráðharrin vísir á, at leitingin komandi tvey árini fer at hava sera stóran týdning fyri eina triðju útbjóðing, sum longu er sett út í kortið at byrja um knapp tvey ár. -Verður olja funnin í komandi boringunum, antin í rakstrarverdugum nøgdum ella í so mikið stórum nøgdum, at hon eggjar til fleiri boringar, so kann tað gera, at stórur áhugi verður fyri 3. útbjóðing.

### Gott við tveimum føroyskum feløgum

Bjarni Djurholm er annars sera fegin um, at bæði tey føroysku oljufeløgini eru við í komandi boring. -Nú hava tey hvør sín profil. Annað leggur seg eftir teimum stóru satsningunum, meðan hitt spjaðir váðan meira. Tað eru tveir ymsir hættir at virka uppá, og tað er eisini áhugavert, tí tá hevur tú møguleika í framtíðini at síggja, hvør er tann besta strategiin, og tað gevur okkum eisini betri møguleika fyri at í hvussu er annað felagið, um ikki bæði, kunnu fóta sær í føroysku oljuvinnuni.

Uppá fyrispurning um ikki pláss er fyri fleiri oljufeløgunum á føroyamiðjunum sigur landsstýrismaðurin, at tað er pláss fyri teimum, sum vilja liva upp til tey krøv og tær treytir, sum vit seta. -Tað eru vit, sum seta treytirnar, og eg haldi, at okkara myndugleikar hava gjørt eitt gott arbeiði og eru væl fyrireikaðir, og tí vilja feløgini eisini geva seg undir hesar treytir. Og øll eru vælkomin, sum taka undir við teimum treytum, sum vit seta teimum. Og tess fleiri feløg vísa áhuga tess betri møguleika hava vit eisini at handla tvs. at vit fáa tað til samfelagið, sum tænir tí best.

## Tímalønin hækkar 50%

**Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya (BLF) og Fíggjarmálaráðið hava í dag gjørt semju um 2-ára sáttmála, ið byggir á lønarvøkstur á 2,6% nominelt. Hartil hækkar tímalønin fyri konsulentarbeiði við 50%**

**BLF-SÁTTMÁLI**
*Jákup Mørk*

Sjálvur lønarvøksturin í sáttmálanum er 0,9% nú og 1,7% næsta ár, men hartil er talan um fleiri aðrar ábøtur á sáttmálan.

Í tíðindaskrivi sigur BLF, at tey fegnast um, at partarnir eru samdir um at orða ein felags almennan stjórasáttmála, soleiðis at búskapar- og løgfrøðingar, ið verða settir í stjórastørv, framyvir verða fevndir av serstøkum stjórasáttmála millum Fíggjarmálaráðið og BLF o.o.

Hartilerínýggjasáttmálanum áset, at tímalønin fyri konsulentarbeiði hjá BLF-limum verður hækkað úr 300 kr. í 450 kr. At ásetingarnar um, hvørjar útbúgvingar eru fevndar av sáttmálanum og hvussu tær verða flokkaðar, verða endurskoðaðar, at endurgjaldið fyri tænastuferðir framyvir støðugt verður dagført, at serstaka frívikan verður sett inn í sáttmálan hjá BLF, at álitisfólkaavtalan verður endurskoðað og dagførd, at avtalan um starvsfólkapolitikk verður betrað við atliti til eldrapolitikk og eftirløn, at strategisk og skipað førleikamenning nú skal fremjast í verki.

Hinvegin er BLF ikki serliga fegið um, at Landstýrið framhaldandi tengir eftirlønina at LÍV, soleiðis at frælsið hjá limunum at velja eftirlønarskipan verður skert. Eitt frælsi, sum felagið heldur vera fortreytina fyri, at kapping kemur á eftirlønarøkið. Limir hjá BLF, sum ikki eru í starvi hjá tí almenna, hava tó frítt at velja, hvørja eftirlønaruppsparing tey vilja hava.